FYLGISKJAL 2.

LM-018/2022

almannaverkið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 26. august 2022
J.nr.: 650.K04-0015/22-1
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.:

Viðgjørt: Elsa Maria Eliesarsdóttir Poulsen

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um oljuískoyti til húski.
Almannaverkið hevur havt uppskotið um oljuískoyti til húski til hoyringar og hava vit eina viðmerking til lógaruppskotið.

Almannaverkið vil gera vart við, at oljuískoyti kann hava ávirkan á veitingar so sum uppihaldsveiting og fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur eftir almannalógini og persónliga viðbót eftir almannapensjónslógini, tann mánaðin ískoyti verður útgoldið.

Treytirnar fyri at veita ískoyti til stakútreiðslur og persónliga viðbót eru, at persónurin sjálvur ikki er førur fyri at bera útreiðsluna. Og sambært § 21 í almannalógini skal øll inntøka verða drigin frá uppihaldsveitingini, tó undantikið barnastuðul so sum barnagjald, barnaískoyti til uppihaldarar, familjuískoyti og hjálp frá privatum hjálparfelagsskapum.

Almannaverkið metir ikki, at oljuískoyti kemur undir undantaksregluna, sum nú er, tí talan er ikki um familjuískoyti og treytirnar eru heldur ikki heilt tær somu. Sama ger seg galdandi við persónligari viðbót. Her verður ásett í kunngerðini, at sum inntøka verður roknað øll inntøka hjá pensjónistinum, tó frárokna barnaviðbót, røktarviðbót og hjálparviðbót og viðbót til ávísar pensjónistar sambært løgtingslóg um ávísar pensjónistar. Viðmerkjast skal, at tað eru ikki nógvir pensjónistar, sum fáa leypandi persónliga viðbót, men nakrir eru.

Almannaverkið vil tí skjóta upp, at ásett verður, at oljuískoyti ikki hevur ávirkan á útgjøldini eftir almannalógini og almannapensjónslógini.
Almannaverkið hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Vegna Almannaverkið

Elsa Maria Eliesarsdóttir Poulsen
Fulltrúi

Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn • Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo